## Føroyskur venjari í Skjold

Sanoyingurin Frankie Jensen er blivin venjari í danska felagnum Skjold. Hann venur 2. lið í felagnum, sum spælir í Danmarksseriuni. 1. lið hjá Skjold spælir í 2. deild, sum er beint omanfyri Danmarksseriuna. Frankie Jensen hevur í fleiri ár verið venjari í ÍF Føroyum. Í ár hevur hann vant føroyska útisetaliðið saman við Julian Hansen, men Frankie skal fram til næsta summar venja næstbesta liðið hjá Skjold. Frankie Jensen fer í januar undir at taka A-venjaraútbúgvingina hjá DBU, og tað skal hann gera saman við onkrum venjarum úr 1. deild og úr superliguni.

## Wenger stúrir fyri málmonnunum

Chelsea-málmaðurin Petr Cech fekk um vikuskiftið kraniubrot og kann ikki spæla næsta mánaðirnar. Hetta hendi eftir ein samanstoyt við ein útispælara. Nú tekur Arsenal-venjarin Arsene Wenger til orðanna ímóti harða spælinum, og hann heldur, at tað er bert ein spurnignur um tíð, áðrenn ein málmaður letur lív, verður ikki okkurt gjørt fyri at verja teir betur. Eisini málmaðurin hjá Arsenal, týskarin Jens Lehmann, stúrir fyri gongdini.

– Í ár hava tað verið fýra hendingar, har málmenn hava fingið stóran skaða. Tað er ikki av tilvild. Allir fingið stórar skaðar av klossutum taklingum, sigur Lehmann.





*KÍF vann kappingina hjá kvinnunum. Leikararnir eru: Standandi: Nina Brockie, Jákup Fjallsbak, hjálparvenjari, Angilie Johannesen, Hjørdis Johannesen, Guðrið Syderbø, Sóley Poulsen, Birita Joensen og Kristian Mikkelsen, venjari. Húkandi: Maiken Sigmundsdóttir, Sólrun Petersen, Ella Joensen og Rannvá Dam*



*Mjølnir vann kappingina hjá monnunum. Leikararnir eru: Standandi: Hjalti Josefsen, Torvald Danielsen, Vladimir Vasilev, Bogi H. Isaksen, Eyðstein Elttør, Bárður Venned. Húkandi: Leif á Stongunum, Jón Syderbø, Gunnar Jørgensen og Hanni Niclasen*

# alistunum funnir

avgerandi síðsta dysti. Her megnaðu kvinnurnar hjá Fleyr at draga longra stráðið og vunnu 2-1. Harvið høvdu tær vunnið allar sínar dystir, og so gjørdust tær vinnarar av 1. deild hjá kvinnum frammanfyri Mjølnir á øðrum plássi.

### KÍF í sína fyrstu steypafinalu

Nógv vendir í dag upp, sum fyrr vendi niður. Hetta er meistaradeildin hjá kvinnum gott dømi um. Næstsíðsta kappingarár endaðu KÍF og SÍ á ávíkavist fimta og sætta plássi í besta kvinnudeildini, og SÍ mátti út í ein upp- og niðurflytingardyst ímóti Fleyr fyri at varðveita lívið í bestu deildini.

Nú er gongdin vend fullkomiliga á høvdið, og hetta var FK-kappingin í vikuskiftinum gott dømi um. KÍF var komið í bólk saman við meistarunum úr Drátti og SÍ. Í fyrsta dystinum vunnu tær 2-1 sigur á SÍ eftir ein javnan og spennandi dyst. Í næsta dystinum ímóti Drátti gekst meir strilti, men eftir at hava tapt fyrsta settið, vunnu kollfjarðakvinnur tvey tey næstu, og so vóru tær komnar víðari úr innleiðandi bólkinum saman við SÍ.

Í semifinaluni møttu tær TB. Aftur hesaferð máttu trý sett til, áðrenn dysturin var avgjørdur, og enn einaferð vann KÍF 2-1. Í hinari semifinaluni møttust SÍ og Mjølnir, og her vann SÍ sannførandi sigur.

Sostatt møttust KÍF og SÍ í finaluni í FK-kappingini, og hetta gjørdist ein sannur gysari. Byrjanin legði annars ikki upp til, at dysturin skuldi blíva serliga spennandi. Her vóru kvinnurnar úr Kollafirði snøgt sagt ov sterkar. Tær vunnu tvey tey fyrstu settini trygt 25-17 og 25-21. Men so vendi dysturin fullkomiliga. Í triðja og fjórða setti hólvaðu sørvágskvinnur KÍF av. Settúrslitini vóru 18-25, 13-25.

Nú var lagt upp til ein avgerandi javnbrótara í kvinnufinaluna, og her gjørdist KÍF tað sterkara liðið. Tær vunnu 15-10, og sostatt hava tær á fyrsta sinni nakrantíð leikt seg í steypafinaluna hjá kvinnum.

### Mjølnir vann hjá monnunum

Hjá monnunum gjørdist Mjølnir vinnari eftir eina spennandi kapping. Í innleiðandi bólkinum vóru teir komnir í bólk saman við SÍ og Fram, og teir fingu eina góða byrjan uppá kappingina. Í fyrsta dystinum vunnu teir 2-1 á SÍ, men í næsta dystinum gekst minni væl. Her blivu teir meir ella minni hólvaðir av ímóti Fram, og sostatt máttu menninir hjá Mjølnir taka til takkar við øðrum plássi í bólkinum.

Í semifinaluni møttu teir ÍF, sum vann hin bólkin, men nú var annað lag á klaksvíkingum. Teir vunnu tryggan 2-0 sigur á ÍF, og so bíðaði Fram aftur í finaluna.

Hesin dysturin byrjaði javnt, og í fyrsta settinum vann Mjølnir 26-24. Í øðrum setti vann Fram tryggan 25-19 sigur, og so var aftur púra javnt. Men so høvdu menninir hjá Mjølnir fingið nokk, og teir vunnu tvey tey síðstu settini 25-22 og 25-20. Harvið vunnu teir FK-kappingini, og vera teir tí eisini partur av steypafinaluni um miðjan februar mánað.

Næstu steypafinalistarnir vera funnir í Mjølnir-kappingini, sum verður í Klaksvík í januar mánað næsta ár, so tá hava øll hini liðini møguleika at leika seg í steypafinaluna ímóti antin KÍF ella Mjølnir.

## Vinnarar menn:

### Meistaradeild menn: Mjølnir

| | |
|---|---|
| Innleiðandi bólkur: | |
| Mjølnir – SÍ | 2-1 |
| Mjølnir – Fram | 0-2 |
| Semifinala: | |
| Mjølnir – ÍF | 2-0 |
| Finala: | |
| Mjølnir – Fram | 3-1 (26-24, 19-25, 25-22, 25-20) |

### 1. deild menn: Fleyr



| | |
|---|---|
| Fleyr – Mjølnir | 2-1 |

Hjá 1. deild meldaðu tvey lið avboð, og tí møttu bara Fleyr og Mjølnir, og kappingin bleiv sostatt avgjørd í einum dysti

### 2. deild menn: Fleyr a



| | |
|---|---|
| Fleyr a – Fleyr b | 2-0 |
| Fleyr a – Mjølnir | 2-0 |
| Fleyr a – ÍF b | 2-1 |
| Fleyr a – ÍF a | 2-1 |

Hjá fyrstu deild vóru bert fimm feløg við, og tí var bert ein bólkur, har øll liðini spældu ímóti øllum.